JOSEF STALIN — EITT FIMTI ÁRA MINNI

# VALDIÐ OG HEIÐURIN

MINNI

*Hanus Kamban*

**Sjeyndi partur**

TANN ENDALIGA LOYSNIN

SUM LONGU nevnt hevði týskurin ætlað at hertikið USSR eftir trimum mánaðum. Ì undanfarna parti av hesi greinarøð vórðu nevndar nakrir atvoldir til, at henda ætlan ikki lukkaðist. Umframt tær ber til at peika á nakrar djúpari grundir, sum í hesi vandastøðu vóru Russlandi til fyrimunar.

Her eiga vit fyrst og fremst at hugsa um fólkanøgdina. Úr Russlandi — sum taldi o.u. 190 milliónir aftur ímóti 75 millión-um í Týsklandi — kundu gandast fram alsamt fleiri milliónir av hermonnum í staðin fyri tær, sum týskurin týndi ella tók til fanga. Síðani kunnu vit nevna víddina, sum hevði við sær logistiskar trupulleikar, eitt nú í Stalingrad, sum vóru at kalla óloysandi. Og endiliga eigur ein at hugsa um veðrið — evjuna — *raputitsa* — sum á vári og heysti darvaði týskinum í ólukkumát, og kuldan, sum á vetri týndi túsundtals at kalla summarklæddar hermenn.

Men ikki minni týdning hevði ein atvold av moralskum slag. Í teimum økjum, sum týskarar í fyrstu atløgu løgdu undir seg, búðu — umframt russarar — seks tjóðir, sum ikki vóru russiskar: póllendingar, litavar, lettar, estlendingar, hvítarussarar og ukrainar. Tann sovjetska undirkúgingin hevði summastaðni í hesum londum verið so hørð og blóðug, at mangastaðni tóku bøndur í 1941 ímóti týskinum við breyði og salti sum tekin um, at teir vóru vælkomnir. Kanska mintust summi, at týskarar undir 1. heimsbardaga høvdu eggjað summum av hesum tjóðum at vinna sær frælsi.

Men tað nýggja Týskland hevði ein annan politikk. Grund undir týskaranna sókn eftir *Lebensraum*, og teirra framferð móti fólki eystanfyri, var tann hugsan, at hesi fólk vóru "undirmenniskjur". Av hægsta stað bleiv kunngjørt, at týskir her-menn høvdu loyvi — og skyldu - til at kúga, drepa og pína frá hond og hvørki eira kvinnum ella børnum.

Børn vórðu brúkt sum skotskivur hjá týskum hermonnum. Kvinnur vórðu í stórum tali neyðtiknar og síðani myrdar. Tær vóru stungnar við bajonettum ella fingu bróstini skorin av. Fólk vórðu sett at grava gravir, síðani vórðu tey skotin, og líkini blakað niður í gravirnar, har tey lógu í dungum. Í einari bygd vórðu fólk stúgvað saman í eini hoyløðu, og síðani eldur settur á. Hetta eru bara nøkur fá hissini dømir um ta nazistisku framferðina. Í størri býum, t.d. Kijev og Rostov, varð týningin løgd meira ruddiliga til rættis við sokallaðum *Grossaktionen.* Fáar dagar eftir at Kijev varð tikin, vórðu 52.000 menn, kvinnur og børn dripin.

Við hesum bæði kriminella og stuttskygda politikki gjørdi leiðslan í Nazi-Týsklandi sítt til at tryggja, at USSR vann 2. heimsbardaga. Tí ikki bara mink-aði tann atburður, sum fylgdi við *Die Endlösung,* nógv um tann hug, sum t.d. ukrainar av sjálvsøgdum grundum kundu hava til at fara í part við týskinum, hon styrkti eisini tann russiska stríðsviljan.



*Russiskir hermenn, við Smolensk, leita eftir einum stað at fara yvir um ánna Dnepr*

Aftrat tí kom, at allir russarar vistu, at innrásin í teirra land var sáttmálabrot og ein svikagerð. Um alt tað russiska ríkið birtist ein treiskur og djúpur vilji til at verja halga, russiska jørð.

MIKROTJÓÐIR Í KAUKASUS

Í KLASSISKUM grikskum bókmentum er søgugongdin ofta soleiðis snarað, at hetjan, eftir at ein vend — *peripeteia* - hevur elvt hennara fall, er fyri tí innaru víðkan, sum grikkar rópa *anagnorisis*, t.e. sjálvsásannan. Um henni annars er lív lagað, tekur hon betri partar fyri seg, fer at liva eitt sannari lív og kanska eisini t.d. vísa øðrum menniskjum miskunn.

Fyri Josef Stalin var Barbarossa hansara peripeteia, tann vend, sum mundi kostað honum sjálvum lívið og veitt tí russiska fólkinum feigd og trældóm. Men eingin sjálvsásannan kom eftir hesa vend. Terroratgerðirnar frá tríatiárunum hildu fram, í prinsippinum óbroyttar, men sjálv-sagt tarnaðar av bardaganum. Revsingin fyri at hopa undan í eini neyðstøðu, sum fyrst og fremst stóðst av Stalins egna ósketni og ódugnaskapi, var deyði ella arbeiðslega. Takkarlønin fyri at vága lív og heilsu fyri føðilandið var mangan eitt skot fyri pannuna, ella vanæra og ófrælsi fyri ein sjálvan, maka og børn.

Ein serliga áhugaverdur partur av hesi søgu er tann viðferð, sum nakrar av smátjóðunum í USSR fingu í hesum árum. Líkasum Napoleon keisari, sum kom av Korsika, var stórfraklendingur, var tann rótleysi georgiarin Josef Stalin stórrussari. Og sum tíðin leið fór hann at líkjast sínum undanmonnum í Kreml meira og meira. Ivan hin Mikli og hansara eftirmenn plagdu av politiskum grundum at flyta heilar tjóðir til fjarskotin støð í tí velduga ríkinum.

Leiðslan í Kreml læt í krígsárunum fólk í stórum tali tvingsilsflyta, eitt nú jødar, baltar, grikkar og ukrainar. Men umframt hetta skipaði hon fyri tvingsilsflutningum, sum raktu átta heilar tjóðir. Tann fyrsta av hesum atgerðum varð framd í 1941 og varð vend móti volgatýskarum. Atburðurin móti teimum var serliga óreinur. NKVD-menn lupu í fallskíggja, ílatnir sum hitlertýskarar, niður í landið, har volgatýskarar búðu. Teir volgatýskarar, sum tóku væl ímóti sínum landsmonnum, vórðu straks skotnir. Hinir blivu tvingsilsfluttir.

Millum oktober 1943 og november 1944 vórðu sjey tjóðir í Kaukasus tvingsilsfluttar við hørðum. Tær vóru: kekenar, ingusjar, karakjeiar, balkarar úr Norðurkaukasus, kalmykkar av vallfløtunum í ein útnyrðing úr Kaspiska Havi, krimtartarar og mesjketar. Hesir seinastu, 200.000 tilsamans, vórðu fluttir av hernaðarligum grundum. Hinar tjóðirnar vórðu fluttar, tí tær búðu í landspørtum, sum høvdu verið undir týskum valdi, og vórðu lagdar undir at semjast væl við fíggindan.

Atferðin móti kekenum varð løgd til rættis við serligum stalinskum óreinsskapi. Fólk vórðu lokkað at koma saman á degnum hjá Reyða Herinum tann 23. februar 1944 at síggja hervenjingar. Meðan hesi góðvarnu fólkini stuttleikaðu sær uttandura í fjøllunum, søktu hermenninir at teimum, skutu mong og noyddu hini inn í góðsvognar, sum USSR hevði fingið takkað veri Leigu- og Lánslógini, og flutti tey burtur.

Mín kelda til hesar upplýsingar er bókin *The Nation Killers,* 1970, eftir Robert Conquest. Høvundurin upplýsir, at tær átta tjóðirnar, sum vóru fyri hesi lagnu, taldu tilsamans 1.650.000 fólk. Òneyðugt er at siga, at fólk í stórum tali lótu lív av hesi viðferð, umframt at hon eisini hótti mál, mentan og møguleika at fetta sær í framtíðini. Tólv ár eftir burturflutningin varð borið so í bandi, at nakrar av hesum tjóðum fingu uppreising og sluppu heimaftur. Sum heild er hesin politikkur eitt skúladømi um tað kriminella stuttskygni, sum eyðkendi stalinismuna. Trupulleikarnir í Kekenia, sum tað nýggja Russland hevur arvað, eru ein beinleiðis avleiðing av hesum atgerðum.

TANN MIKLA SAMGONGAN

ÆTLANIN ER ikki í hesi greinrøð at greiða út í æsir frá gongdini í krígnum móti Týsklandi. Í stuttum kunnu vit siga, at bardagin við Kursk í juli og august 1943 var tað seinasta av trimum nosum, sum fingu týskin at hopa undan og dvína. Aftur hesa ferð vóru tað Zjukov og Vasilevskij, sum løgdu upp ráð um vælir og hernsnildir, og aftur hesa ferð brúktu teir eina samanseting av virknum defensivi og — síðani — klíputangardánaðum álopi.

Sum nevnt fyrr eydnaðist tað Hitleri — við sínum psykopatisku evnum til at skapa tann vanda, hann mest av øllum ræddist — at fáa ein bardaga á tveimum hermótum. Longu sama dag sum Barbarossa byrjaði, boðaði Winston Churchill í Undirhúsinum frá, at Ongland og USSR nú vóru krígsfelagar. Ein stívan mánað seinni sendi amerikanski forsetin Franklin D. Roosevelt sín serliga sendimann, Harry Hopkins, til Moskva at tingast við Stalin um amerikanska hjálp til USSR. Tann mikla samgongan — *the grand alliance* — sum at enda basti Týsklandi, var nú ein veruleiki.

Sum árini gingu, og tað so líðandi bleiv týðiligt, at týskurin fór at bíta í grasið, var framskygdum fólkum greitt, at ein nýggj geopolitisk støða fór at taka seg upp í





*Á fundi í Jalta í februar 1945. Churchill, Roosevelt og Stalin*

heiminum. Europa fór at blíva savnað, Týskland fór at liggja í sori í langa tíð, men — hvør sínu megin Europa — fóru tvey nýggj heimsveldir at rísa. Tað nýggja meginríkið eystanfyri — USSR, albrynjað — fór at varpa sín skugga vestur yvir eitt nógv viknað Europa.

Henda støða hevði við sær, at teir tríggir ríkisovastarnir hjá teimum sameindu, saman við de Gaulle úr Fraklandi, máttu hittast og royna at semjast um at leggja ætlanir fyri framtíðina. Sum vit minnast, hevði Stalin nóg illa verið uttanlands, bara gjørt eitt rend til London og eitt til Tammerfors, og steðgað o.u. ein mánað í München í 1913. Men í samráðingunum tann 23. august 1939 við von Ribbentrop hevði hann longu staðið sína sveinsroynd sum diplomatur — væl og virðiliga.

TINGINGAR VIÐ CHURCHILL

Í samráðingunum við Ongland og USA læt Stalin fyrst sín uttanríkisráðharra Molotov umboða USSR. Sjálvur umboðaði hann Sovjetsamveldið á trimum meginfundum — í Teheran 28. nov.—1. des. 1943, í Jalta á Krim 4.-11. februar 1945 og í Potsdam 16. juli—2. august 1945. Á hesum fundum hitti hann Winston Churchill og Franklin D. Roosevelt og á tí seinasta fundinum, eftir at Churchill var fráfarin og Roosevelt deyður, Clement Attlee og Harry S. Truman. Churchill og Stalin samráddust eisini tveireinir á serfundum.

Teheran-fundurin var helst tann týdningarmesta av hesum tingingum. Tað vóru ikki sneisaørindir, hesir Tríggir Hægstu gjørdu sær, og tað vóru ikki smámál, teir tingaðust um og loystu á sín serliga bæði eirindaleysa og tilvildarliga hátt. Í roynd og veru gjørdu teir av framtíðina fyri Europa ta komandi hálvu øldina.

Hvør teirra kom á fund við sínum serligu krøvum, ætlanum og ynskjum. Hjartamálið hjá Roosevelt var ein nýggjur felagsskapur landanna millum, sum skuldi tryggja, at eitt slíkt oyðandi kríggj ongantíð aftur brast á í heiminum. Stalin — realpolitikarin — legði dent á at varðveita tey landamørk vestureftir, sum USSR vann sær í 1939 og seinni, at tryggja USSR yvirvág í Eystureuropa og (í Teheran) at fáa sínar sameindu at opna eitt nýtt hermóti vestanfyri. Málið hjá Churchill var at bjarga tí sum bjargast kundi av Eystureuropa undan tí sovjetsku klónni og at tryggja Onglandi ávirkan í eystara Miðalhavi og á Balkan.

Roosevelt sýntist ikki at vísa Europa nógvan áhuga, og teir, sum í roynd og veru gjørdu av framtíðina hjá 100 milliónum av eystureuropearum ta komandi hálvu øldina, vóru Churchill og Stalin. Báðir vóru vitandi um, hvat týdning hesar avgerðir fóru at fáa. Stalin hevði tann fyrimun, at hann visti, hvat hann vildi, at tann hernaðarliga støðan hjá USSR var alsamt styrknandi, og at hansara mótmenn — sum á sinni undan teimum, í eini heilt aðrari togan, Zinovjev,

*Framhald á síðu 6*



*Á fundi í Teheran 1943. Stalin kyssir svørðið frá Georg VI*